# Undirvísingar- og mentamálastýrið

## Lærugreinaráðgevi í føroyskum

### fyri vinnu-, miðnáms- og hægri útbúgvingar

**Starvið**
Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum lærugreinaráðgevi í føroyskum fyri vinnu-, miðnáms- og hægri útbúgvingar leyst at søkja til setanar 1. august 2000.

Høvuðsuppgávurnar hjá lærugreinaráðgevanum verða m.a., at:

- Menna innihald og góðsku í lærugreinini føroyskt
- Hava námsfrøðiligt eftirlit við undirvísingini í føroyskum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan fakøkið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Stíla fyri eftirútbúgving av lærarum
- Luttaka í verkætlanum serliga á tí námsfrøðiliga økinum og innan KT-økið
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugafelagsskapir

Lærugreinaráðgevin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans krøv.

Viðkomandi má umframt omanfyri nevndu uppgávur vera til reiðar at átaka sær aðrar almennar uppgávur í fyrisitingini.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarnir hava

- Kandidatprógv frá universiteti við prógvi í føroyskum, sum í minsta lagi skal vera á exam.art-stigi
- Verkliga og ástøðiliga námsfrøðiliga útbúgving
- Undirvísingarroyndir á miðnámsstigi ella hægri stigi
- Áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- Góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- Førleika at menna samstarvið við einstøku stovnarnar, lærararnar og áhugafelagsskapir
- Áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Lærugreinaráðgevin verður settur í fyrstu atløgu í 3 ár. Síðani kann setanartíðin eftir umsókn verða longd tvær ferðir við tveimum árum hvørja ferð. Um serstøk viðurskifti gera seg galdandi, kann setanarskeiðið verða longt meira enn 7 ár.

Arbeiðstíðin í ráðgevarastarvinum er 2/3 av fullari arbeiðstíð. Eftir nærri avtalu millum Undirvísingar- og Mentamálastýrið og viðkomandi útbúgvingarstovn skal tann, ið settur verður sum ráðgevi, harumframt undirvísa í mesta lagi 1/3 starv í einum vinnu- ella miðnámsskúla ella hægri útbúgvingarstovni.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrið og deildir og stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. mai 2000.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Rúnu Hilduberg, deildarstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, á tlf. 355050

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**Í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini** eru Studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlarnir, Teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlin, Sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlin og lærlingaútbúgvingar.
Málsøki hjá Mentamáladeildini eru m.o. Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli, Sjúkrasystraskúli Føroya, Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya, siðsøguligu søvnini, bókasavnsverkið, gransking, ítrótt, kirkjumál, ungdómsmál og mentanarligt virksemi sum t.d. bókmentir, myndlist,tónlist og leiklist.

## Leiðari og varaleiðari til Sambýlið á Bóndaheygi 14

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu í Sambýlinum á Bóndaheygi 14 í Havn, er eitt tænastumannastarv sum leiðari og eitt sum varaleiðari leyst at søkja til setan 1. juli ella 1. august 2000.

Størvini verða sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, leiðarastarvið lønt í lønarflokki 26 + viðbót og varaleiðarastarvið lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Sambýlið er heim hjá 5 fólkum við serligum tørvi. Uppgávan hjá leiðaranum er, saman við starvsfólkunum, at skipa ein tryggan og mennandi gerandisdag fyri íbúgvarnar. Sambýlið skipar fyri bæði arbeiði og frítíðartilboðum til íbúgvarnar. Uppgávan hjá varaleiðaranum er stuðla leiðaranum í leiðsluarbeiðinum og at yvirtaka leiðarans uppgávur, tá hesin ikki er til staðar.

Fyristøðufólkið hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av sambýlinum.

Væntað verður av leiðaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum kann tryggja sambýlinum eina positiva menning.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir á pedagogiska økinum, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Væntað verður av varaleiðaranum, at hann hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiði í gerandisdegnum at ganga so væl sum gjørligt.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja størvini.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Bjarna Clementsen á tlf. 315426. Umsóknarfreistin er 22. mai 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
Sigmundargøta 5
FO-100 Tórshavn

## Kvøldseta dýrabiðidag

Kvøldseta 19.5.2000 í Framtíðini í Vági við ábiti og dansi. Gestasangarar verða Eivør Pállsdóttir og Ragnar í Vík. Ymiskt undirhald t.d. »nær var tað« kapping o.a.

Tónleikarabólkur fyri tey eldru fríggjakvøldið og fyri tey ungu leygarkvøldið, nærri verður lýst seinni.

**Vágs Matmøðrafelag**

## Timburmenn søkjast

Søkt verður eftir timburmonnum, til arbeiði í Keypmannahavn og Jýtlandi, góð løn verður givin.

- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Møguleiki fyri akkordarbeiði

**Sp/f Fær-Byg**
826 Trongisvágur
Tlf. 372626 & 210626

SUMMARDEKK
KUMHO DEKK
EURO Tyfoon
- ein góð loysn
ES
Sosialurin - 311820



# Tann árliga ballettframsýningin hjá Yndi

Tann árliga várballettframsýningin hjá Yndi verður mikudagin 3. mai kl. 19.30.

Aldursbólkurin hjá teimum, sum eru við, er úr seks árum og uppeftir.

Í ár fer Yndi at hava ballettframsýningina saman við teimum ungu studentaskúlanæmingunum, sum fyri stuttum vóru á palli í Norðurlandahúsinum við tí kenda og vælumtókta sangleikinum »Hair«.

Leiðari fyri ballettini Yndi er, eins og hini árini, Elsa Maria Bærentsen.

Atgongumerkir til mikudagin 3. mai eru at fáa á Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum.

## Seks vilja vera landsverkfrøðingur

Tá freistin at søkja starvið sum landsverkfrøðingur var úti í gjár, vóru komnar inn seks umsóknir.

Síðani Henning Jacobsen varð koyrdur úr starvi sum landsverkfrøðingur í desember 1998, hevur Hans Biskopstø røkt starvið.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**

*1. mai 2000*

# Solidariska hugsjónin

Sosialismunnar alheims vinir
humanistiska fólkaræði í hásæti
ei fjøtraðir í tjóðbúna kalda
hægri skoða døtu rog synir
hugsjónarandin møti
yvir fákunnuleikanumv alda.

Óteljandi andsmenni vinarskarin telur
sláa ring – brøðralags stevið
rættvísishugsjónin frama fremur
andaliga vkti hópurin velur
í hjarta framskygnartevið
frælsislogan ungdómur nemur.

Tann eitrandi líkasæla
brennið á sj´lavsóknarbálið
borgarligi tvitni gjósturin kaldi
Hoyrið nú stríðshanan gala!
Svá geislar solidariski skáli!
Skamma stund – sosialisman fær valdið!

Einavaldsins eitrandi marglætisdagar
elitan og snákur við háborðs sita
tváa skarnið – nikkudukkur, frúur fínu
høgrarák og líkasæla úr køstinum kagar
lata seg doyva av kellingahita
mafia-gorlakkar draga somu línu.

Ríkmenni fleiri og fleiri í tali
mikla fjøldin, kúgað, traðkað, háðað
marglætisgudin hátt tilbiðja
ósolidariski hugburður sigrar á vali
hánasaða harkaliðið mistreysti sáað
svá spælidukkur og støðuleysu tiga.

Yvirstættsins tjóvagóðs kúgaðu krevja
men rótfest er trælalyndið
jú minni gera – tess meira fáa
skarn og reinleika saman vevja
luksusdýrini á hægsta tindi
drepandi líkasæla – hópin háða.

Tann árvakna, mergjaða stríðsblóma
sprænir sína andsfúsu megi
yvirstætsins rotinskap sjónliga síggja
Socialismunnar bjarging tó hóma!
Kammeratar! Stríðsfús á rættvísisvegi
sjálvsóknarandar – hástóru – flýggja.

Orðaskvaldur, líkasæla á borgarligum hesti
fær luksusdýrini at blóma
Fakfeløg – fólksins rættur og styrki
maktgreðingsins fíggindi versti
Stríðsbrandin hevja – kúgaðu til sóma!
Socialismunnar mætasta yrki.

Aðalverkfall! Í reyða stríðsbúnan lata!
deyðsdømdu høgrakreftir niðurbinda
Arbeiðarafjøldin sameind til verka
byrjað solidariska stríðið mæta!
Javnrættarbálið mikla kyndað!
Kammeratar! Vær verjum stríðsandan sterka!

**Sólmunur Joensen**

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
Vitja okkum á Bilframsýningini 2000 á Hálsi.
KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar
Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"

Fæst eisini sum vøruvognur

EINANS 187.800,-
Multibilurin til einhvørja loysn
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.
3 ára garanti/100.000 km. garanti

EINANS 225.800,-
Rætti bilurin til mong endamál. –Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.
D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600
Sosialurin - 311820